miðvikan
Nr. 181 • 23. september 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

## Frásøgn frá 1934:

# Tveir brandar úr Syðrugøtu

**Hesaferð lýsa vit tveir áhugaverdar syðrugøtumenn, sum fóru av bygdini og vóru við at skapa søgu í Rituvík og Skála. Hesar greinir geva eitt sera gott innlit í bæði vinnuviðurskifti og í viðurskifti hjá »vanligum fólki« seinna partin av 19. øld og fyrra partin av 20 øld**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

### Jóan Jákup var niðursetumaður í Rituvík

Jóan Jákup var ættaður úr Ólastovu í Syðrugøtu. Hann greiðir frá:

**Var við Niclas á Trappuni**

Eg havi altíð havt góðan sjóhug. Eg var við einum tí fyrsta føroyska fiskiskipinum, ið royndi undir Føroyum og Íslandi. Tað var sluppin Sprite, ið Trappubrøðurnir í Havn høvdu keypt í 1878. Teir vóru tríggir brøður: Niclas, ið var skipari, Dánjal, sum var bestimaður og Petur. Um várið varð roynt undir Føroyum. 25. februar fóru vit á fyrsta sinni til Íslands. Fyrst royndu vit í Mýrubuktini. Har fiskaðu nógvir fransar. So royndu vit í Faksabuktini, men har var lítið at fáa. Skiparin var av allar raskastu monnum, nærlagdur og dugnaligur. Men hann píndist av einari ringari astmu, og mitt undir fiskiskapinum gjørdist hann so sjúkur, at vit máttu inn á sjúkrahús í Reykjavík við honum.

Tilsamans fingu vit 19.000 fiskar. Tað var torført at fáa mann í Niclasar stað. Í teirri tíðini vóru skiparar ikki lærdir á sama hátt sum nú. Vit fingu ein skipara frá Gjógv at føra skipið á Eysturlandið. Men tá vit best vóru komnir millum londini, dugdi hesin nýggi skiparin ikki at seta kós eftir Niclasar kós. Vit komu tó vegin fram og fiskaðu við bátum útfrá Norðfirði. Við Sprite var eg tvey ár tilsamans.

Síðan havi eg verið við nógvum skipum. Við Lalla Rookh var eg eitt summar undir Føroyum. Sjey ár var eg við Silver Belle og av øðrum skipum kann eg nevna Saltaire, Katrine, William Martin, William Cloves og Nólsoyggin.

### Blindur til sjós

Átta ár havi eg verið blindur á Suðurlandinum. Tað eru 6 ár síðan eg legðist uppi 77 ára gamal, men enn havi eg líka góðan hug at fara til sjós. Hvønn morgun vakni eg klokkan fýra – til útpurring – av gomlum vana. At halda snøri og at draga, avhøvda og hála sjógv í karið, hetta kundi eg alt gera blindur. Tað bilaði bert eitt sindur at egna.

Eg fór til Lamba og var húskallur hjá Hálvdani bónda. Hann hevði ein 6 marka garð og nógv var at takast við. Eg luttók í øllum fyrifallandi arbeiði og gekk fjøllini saman við hinum monnunum. Har er nógva staðni ringt og vágaligt at ganga.

Eina ferð vit vóru á fjalli slapp eg mær burtur úr fylginum. Eg visti, at lundi átti eina staðni niðri í berginum og hugurin dró meg at granska hetta eitt nærri. Eg klintraði varliga og spakuliga niður í bergið. Heldur illa gekk at fáa fótafesti, og uppi frá hæddini skoðaði eg niður í hitt kolbláa, øgismikla hav. Í øllum góðum eydnaðist mær tó at koma niður á ta lítlu rók, har eg vónaði at fáa høvi til at taka lundar í holuni. Men gakk. Uppaftur var ikki hugsandi at koma. Vónirnar vóru alt annað enn ljósar. Eftir at hava sæð, hvussu statt var, og hvussu vónleyst tað var at klinrta upp aftur, legði eg meg niður og lat alt í Guds hond. Og brátt sveiptist myrkrið um land og hav, og hin trølsliga náttin hvíldi yvir øllum. Soleiðis lá eg "fortaptur" niðri í berginum til næsta morgun, tá tað endiliga eydnaðist monnum, ið vóru farnir at leita eftir mær, at hála meg upp við línu.



*Johanna og Jóan Jakku vóru millum fyrstu niðursetufólkini í Rituvík*



*Minnisvarðin yvir teir, sum bygdu Rituvík. Jóan Jákup og kona hansara Johanna var millum teirra*

### Ljós á miðju nátt

Lamba er brimpláss, og tað er tí mangan torført at rógva út haðani. Eg kann minnast eina hættisliga ferð norð á hav. Útróðurin var óførur í teirri tíðini. Og hendan dagin høvdu vit fiskað heilt væl, vit vóru 8 manns á báti. Men vit hildu ov leingi á, og náttin var komin yvir okkum, áðrenn vit reiðuliga góvu okkum far um, hvussu seint tað var vorðið. Ættin lá inn á landi. Í myrkrinum vóru vit illa staddir, og vit drivu nærri og nærri at landi. So við eitt fyltist báturin av sjógv og slongdist inn í urðina. Ein maður druknaði, meðan vit sjey vórðu kastaðir uppá land av aldunum. Eg skolaðist uppá eina hellu. Eg dugdi onga bjarging at síggja. Brimið rótaði, og aftanfyri meg var hin steyrrætti fjallaveggur.

Tá var tað, sum eitt undur hendi. Knappliga gjørdist alt ljóst í eygum mínum. Tað var klárt sum á degi í nøkur sekund. Eg fekk passað eitt óløgi og varð bjargaður.

Fyrr í tíðini vóru so óføra góð fiskilíkindi í advent. Tá lógu bátarnir oftast úti allar tær ljósu næturnar. Tað var at taka línuna upp og seta niður aftur, til báturin var fyltur.

Okkurt um tvey ár búði eg í Oyndarfirði og róði á Norðhavið saman við oyndfirðingum. Tá á døgum var fiskiskapurin undir Føroyum av tí mesta. Eingir vóru trolararnir til at oyða grunnarnar. Vit vóru sum oftast átta mans á báti og royndu allar seks dagarnar, bert veður var til tað. Ikki vóru vit vanir at hava meira enn 8 stykki av línu, og enntá var tað ov nógv viðhvørt.

### Til Havnar at selja torv

Tað eru átta gomul hús her í Rituvík, og av teimum átta monnum, ið bygdu bygdina eru tríggir á lívi umfram meg sjálvan.